VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul til strúk í vindi av útsynningi. Skýggjað og ælaveður, tó eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig



Veðrið leygardagin :
Andøvsgul til strúk í vindi av suðri, sum snarar í landsynning og minkar nakað. At byrja við ælaveður, men út á seinnapartin skýggjað og nakað av regni. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið sunnudagin, mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi. Skýggjað við regni ella ælaveðri. Hitin millum 5 til 8 stig.

Guðrun syngur í Tivoli

Guðrun Sólja Jacobsen og Gunnar Mikkelsen verða við, tá ið ársins fyrsta konsert verður á Plenuni í Tivoli verður í kvøld. Nýggi plátufelagsstjórin hjá Guðrun Sólju heldur, at hon kann gerast ein heimsstjørna

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Tivoli í Keypmannahavn ger nógv burtur úr at hava góðar konsertir fríggjakvøld, og í summar skulu nógv kend nøvn spæla har – alt frá Shubidua og Kim Larsen til Lisu Ekdahl og Suzi Quattro.

Vanliga kemur sera nógv fólk til hesar konsertir, og stundum hevur næstan verið rumbul í Tivoli av teimum túsundtals fólkunum, sum hava leitað sær til konsert.

Tey, sum sleppa at byrja hetta summarið, eru sangarar frá kappingini Stjørna í eitt kvøld.

Fýra sangarar eru slopnir upp í part, og umframt tey bæði av føroyskari ætt – Guðrun og Gunnar – skulu Jacob Andersen og Jan Nielsen eisini syngja.

Kann koma langt

Guðrun Sólja Jacobsen kann eisini fegnast um, at hennara fyrsta útgáva, Quiet Storm, seldi óføra væl, og higartil eru eini 40.000 eintøk av fløguni farin um handilsdiskarnar í Danmark.

Hetta verður mett sum óføra gott, tí sølan av fløgum í Danmark er nógv minkað seinastu tvey árini. Nú skal Guðrun gera eina nýggja fløgu, og tað verður fyri plátuferlagið My Way Music. Stjórin har arbeiddi fyri Universal, sum gav fyrstu fløguna hjá Guðrun út, men hann hevur gjørt sítt egna plátufelag nú, og hann heldur nógv av Guðrun.

– Guðrun hevur eina rødd, sum kann gera hana til eina heimsstjørnu á hædd við Celine Dion og Whitney Houston. Hun er avgjørt ein av teimum allarbestu sangarunum í Danmark., sigur Henrik Sørensen við danska blaðið, BT.

Ætlanin er, at Guðrun Sólja skal koma við nýggjari útgávu í oktober mánaði. Tað verður Stig Kreutzfeldt, sum skal framleiða tónleikin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷10
Nuuk	÷5
Qaqortoq	1
Ammassalik	0
Saint John's	8
Halifax	7
Reykjavík	4
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	8
Lerwick	8
Aberdeen	14
London	14
Tromsø	4
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	13
Keypmannah.	10
Helsinki	10
Moskva	7
Berlin	13
Warzawa	10
Kiev	11
Bukarest	11
Paris	13
Madrid	13
Róm	15
Malorca	16
Athen	17
Malta	18
Tunis	19
Beijing	28
New Dehli	36
Bangkok	37
Jakarta	32
Sydney	25
New York	10
Miami	17
Los Angeles	–
Meksikobýur	20
Panama	–
La Paz	14
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	15

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt stormlágtrýst vestan fyri Føroyar fer norðureftir og dýpist.



Leygardagin fer eitt nýtt lágtrýst úr Suðurgrønlandi til havið í ein útnyrðing úr Bretsku oyggjunum, har tað verður liggjandi til mánadagin. Seinni kemur eitt annað lágtrýst vestaneftir móti Bretsku oyggjunum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 14/04 kl. 06⁰⁰– 15/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,7°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 8,0 mm – mált frá 14/04 kl. 06⁰⁰–15/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 36,1 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

8. apríl: Mánin næstur jørðini
12. apríl: Seinna kvarter
19. apríl: Tendring
24. apríl: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
16. apr	05.22	17.44	04.22	16.44	04.37	16.59	07.22	19.44	08.22	20.44	03.37	15.59	02.37	14.59	05.37	17.59	06.37	18.59	05.07	17.29	06.22	18.44
17. apr	06.04	18.25	05.04	17.25	05.19	17.40	08.04	20.25	09.04	21.25	04.19	16.40	03.19	15.40	06.19	18.40	07.19	19.40	05.49	18.10	07.04	19.25
18. apr	06.45	19.04	05.45	18.04	06.00	18.19	08.45	21.04	09.45	22.04	05.00	17.19	04.00	16.19	07.00	19.19	08.00	20.19	06.30	18.49	07.45	20.04
19. apr	07.24	19.43	06.24	18.43	06.39	18.58	09.24	21.43	10.24	22.43	05.39	17.58	04.39	16.58	07.39	19.58	08.39	20.58	07.09	19.28	08.24	20.43

5 707265 100050 >